Fótbóltssamband Føroya
The Faroe Islands' F.A.
Member of FIFA - UEFA - ÍSF

P.O. Box 3028
Gundadalur
FO-110 Tórshavn
FØROYAR (FAROE ISLANDS)

Telefon +298 35 19 79
Telefax +298 31 90 79
e-mail: fsf@football.fo
website: www.football.fo

**Tíðindaskriv**

Peningasambond:

| | |
|---|---|
| Føroya Sparikassi | 9181 - 263.457.2 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 - 100.699.6 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 - 100.251.2 |
| Pf. Føroya Banki | 6460 - 100.390.0 |
| Postgiro | 9909 - 006.858.6 |


Dagf.: 06.04.2009

Ref.: HíS/ím

**Brian Kerr verður nýggjur føroyskur landsliðsvenjari**

Fótbóltssamband Føroya hevur í dag útnevnt íran Brian Kerr til nýggjan A-landsliðsvenjara. Kerr tekur við uppgávuni beinanvegin, og sáttmálin er galdandi í tvey og eitt hálvt ár.
Valið av Kerr til nýggjan landsliðsvenjara varð gjørt eftir samrøður við Høgna í Stórustovu, FSF-forseta, Magnus á Stongum, formann í landsliðsnevnd FSF's og Ísak Mikladal, aðalskrivara. Avgerðin er einmælt samtykt av starvsnevnd FSF's.
Umframt ábyrgdina av A-landsliðnum, verður nýggja landsliðsvenjaranum litið í hendur at standa á odda fyri leikaramenningini, talentmenningini og menningini av øllum ungdómslandsliðunum hjá FSF.
Kerr hevur drúgvar royndir sum venjari og manager hjá m.a. írska landsliðnum og hjá St. Patrick's Athletic F.C. í bestu írsku fótbóltsdeildini. Sum tekniskur stjóri hjá írska fótbóltssambandinum FAI hevur hann eisini verið venjari hjá írsku ungdómslandsliðunum, serliga U16 og U18. Brian Kerr hevur sum venjari vunnið írska meistaraheitið tvær ferðir eins og evropameistaraheitið fyri U16 og U18 landslið. Sum írskur landsliðsvenjari eydnaðist tað Kerr at føra lið sítt fram á 12. pláss á FIFA-styrkilistanum.
Høgni í Stórustovu sigur: *"Tá vit fóru undir at leita eftir einum nýggjum landsliðsvenjara, samdust vit um, at okkum tørvaði ein væl skikkaðan venjara við neyðugum royndum at hjálpa føroyskum fótbólti fram á leið, og eg trúgvi, at við Brian Kerr hava funnið tann rætta mannin.*
*Avrikini hjá Brian Kerr vísa, at hann er førur fyri at náa úrslit eins væl og menna ein grundvøll at byggja víðari uppá. Vit ivast ikki í, at hann er førur fyri at geva landsliðnum neyðugan eldhuga og vilja, og vit eru ovurfegin um at hann hevur játtað at gerast okkara venjari.*
*Brian Kerr er gitin sum ein venjari við góðum úrslitum og tí rætta hugburðinum. Hann fær fullan stuðul frá okkum øllum í FSF, og vit fegnast stórliga um at hava fingið hann við umborð, og siggja fram til eitt gevandi samstarv.*
Setanin av nýggjum landsliðsvenjara broytir ikki upp á núverandi venjarabygnað hjá FSF, og Brian Kerr verður viðvirkandi til framhaldandi at styrkja um førleikan hjá føroyskum venjarum, føroyskum fótbólti at frama.

Fótbóltssamband Føroya
Ísak Mikladal, aðalskrivari:
T-postur: fsf@football.fo
Telefon: +298 211988

ATLANTIC AIRWAYS
formula.fo